# erugrundarlag okkara



prosjektinum Føroyar, setir tí tíð og orku av til at seta orð á, hvussu ein vil og evnar at leggja orku í at seta stevnumið saman við øðrum, at loysa uppgávurnar saman við øðrum, og saman við øðrum at samskifta innanhýsis og uttanhýsis. Í hesum høpi samskifta vit við teim avgerðum vit taka, við okkara atferð og við tí leikluti, vit geva okkum sjálvum í heildini.

## Mest viðkomandi áhugamálini

**Tilverugrundarlagið í Føroyum er tengt at hvørjum einasta borgara í landinum. Høvuðsspurningurin er, hvussu vit fáa tengt alla tjóðina saman í eina eind, fyri síðani at brúka neyðugu orkuna, har hon liggur frægast fyri í tí einstaka prosjektinum – og samstundis tryggja, at hvør einasti borgari í bygd og í bý fær møguleikan at dugna tjóðini – umfram sær sjálvum. Hetta er eitt vilkor í eini tjóð við 50.000 borgarum.**

Men alt hevur eina byrjan.

Viðkomandi stigtakarar er eitt av mest viðkomandi áhugamálunum, sum viðgjørt omanfyri. Arbeiðshættirnir eru nær tengdir at stigtakarunum. Tí hongur øll menning í tunnum tráð júst á tí økinum. Tað merkir samstundis, at tað er eins avgerandi fyri tjóðina í dag, hvussu vit útvelja og styðja stigtakarin, sum tað fyrr var, hvussu tjóðin útvaldi skilafólkið á sjógvi og landi og í bjørgunum.

Ein annar týðandi partur er fíggjarkervið. Umframt arbeiðshættir er tað alneyðugt, at fíggjarkervið vil og evnar at seta stevnu og arbeiða saman við stigtakarum. Einasta gongda leiðin er, at tann, sum hevur valt prosjektið Føroyar, og sum hevur sett kós eftir at dugna prosjektinum við fíggjarligum íkasti, má eisini seta sær sum strategiskt mál at forvinna pening av hesum íkasti.

Hetta merkir eisini, at prosjekt Føroyar ikki verður dugnað við almennum studningi. Tað førir okkum til tann almenna geiran. Spurningurin er, hvønn leiklut tann almenni geirin skal hava? Mítt uppskot er, at tað almenna skal røkja sína egnu uppgávu so gott, sum yvirhøvur til ber. Í fyrsta lagi við atliti at teirri funktión, viðkomandi eind fyriskipar, og í øðrum lagi við atliti at teim menningarmøguleikum, sum liggja í hesi funktión. Og at samstarva við viðkomandi prosjekt í privata geiranum sambært hesi reglu. Tí eingin menning er møgulig, sum ikki á ein ella annan hátt hevur sítt grundarlag í eini rakstraruppgávu.

Hesin veruleikin, saman við tí veruleika, at stórur partur av tí almenna í hesum høpi hevur verið – og er – í "krígsstøðu" er helst høvuðsorsøkin til at menningarúrslitini eru so eiðasør hesi seinastu 10 árini, síðani kreppan fyrst í níti-árunum hasaði av. **Føroyska tjóðin kann í verki sanna orðini hjá Erik Johnsen: "Erfaringen viser, at det er farligt for både det nuværende og det fremtidige eksistensgrundlag at strække våben." (E. Johnsen, 2006).**

Tann politikarin, sum hevur valt prosjektið Føroyar, hevur tí møguleika at dugna tjóðini, tá ið hann hóast ymisk argument um "effektivitet", "upprudding", "tillaging", "svans" o.a.m. tó megnar at fáa tamarhald á "krígshuginum" innan tey øki, viðkomandi varðar av.

Raðfesta vit týdningin í áhugamálunum, er tað heilt grundleggjandi, at stigtakarar og fíggjarkervi megna at halda kós og møguliga seta meira orku av til menning tað næsta árið ella tvey – í fleiri og fleiri prosjekt. Sjálvt undir teimum umstøðum, tjóðin hevur at bjóða slíkum prosjektum.

Harnæst eiga serliga landsstýrisfólkini at vera á varðhaldi, tá ið tey fáa "krígsavbjóðingar" fyrilagdar til góðkenningar.

## Strategisk útlit

Tann brennandi spurningurin er so, hvørt tað er møguligt at seta so nógv prosjekt í verk við slíkari megi, at tað flytir nakað í heildini. Metingin í dag er, at seinastu 20 árini eru vit í Føroyum í meðal vorðin umleið 3% verri fyri enn danir hvørt 4 ára valskeið. Í 1988 framleiddi hvør føroyingur umleið tað sama, sum hvør dani, og í dag framleiðir hvør føroyingur umleið ¾ av tí, hvør dani framleiðir.

Spurningurin er tí, um vit hava nakran møguleika innanfyri 10 ár at menna vinnuliga grundarlagið so nógv, at vit venda hesum rákinum?

Mítt boð er eitt treytað ja.

Vit hava í dag bæði viðkomandi ætlanir – strategisk prosjekt – og amboð og royndir, sum vit hava fyri neyðini, skal nøkur skipað røð av ætlanum fáast til høldar.

**Prosjektini, sum eru komin rættiliga væl áleiðis, eru í dag helst eini 10-15 í tali, harav eini 3-4 mær vitandi hava týðandi strategiskt potentiali – bæði í beinleiðis úrtøkumøguleikum og sum støði fyri framhaldandi menning og tilgongd av nýggjum prosjektum.** Havast skal í huga, at nakrar fáar hundraðtals milliónir kr. árliga í øktum útflutningi gera mun í føroyska búskapinum. Slík tøl liggja innanfyri teir møguleikar, sum eru í eygsjón í teimum 3-4 mest búnu prosjektunum, so uppgávan er at fáa tey fyrstu prosjektini til høldar, soleiðis at gongd kemur á.

Hóast vinnuframaparturin av almennu Føroyum nú eisini er "krígsherjað øki", hava vit í dag eina "sleipistøð" til nýggjar ætlanir og bæði ástøði og royndir at brúka hana. Hetta ger, at evnini at fáa stóran part av menningarorkuni til høldar í ítøkiligum úrslitum nú eru heilt góð.

Strategisku útlitini eru tengd at tveimum høvuðsspurningum. Annar er, hvørt vit hava tæri til tess. Hóast veruleikin fyri tey flestu økini kenst soleiðis, at orkan er minkandi, meti eg ikki, at tað er nakar stórvegis trupulleiki. Partvíst liggur so nógv orka niðurbundin bæði í fiskivinnuni og í almenna geiranum, at okkum ikki kemur at vanta arbeiðsorku í bræði. Tann mentunarliga og útbúgvingarliga partin av tærinum kunnu vit kanska ivast meira í. Sjálvur meti eg ikki, at tað gerst ein fløskuhálsur, tí samskiftið við hini norðanlond – og onnur lond – kann mennast munandi.

Hin spurningurin er tengdur at okkara vilja og evnum at seta felags stevnu í prosjektinum Føroyar og at loysa uppgávurnar á leiðini í felag. Viljin og evnini til at átaka okkum váðan, sum altíð stendst í sambandi við at seta kós út í tað óroynda. Sjálvur meti eg, at vit í føroysku tjóðini hava nógv í tæguni frá teimum, sum undan gingu.

**Arbeiðsumtøðurnar hjá føroyskum stigtakarum kunnu lættliga lýsast við myndunum "Møsnará" og "krígsherjað øki". Í gerandisdegnum skal stigtakarin fyri stóran part vassa í runuvatni upp undir miðju í "Møsnará". Alt eftir, hvussu heppin ein hevur verið at stýra uttanum "krígsherjað øki", skal ein ígjøgnum eitt slíkt nos eina ella tvær ferðir árliga – tá ið heilt væl stendur til, annað hvørt ár. Undir hesum umstøðum skal kós og ferð í prosjektinum haldast, skal nakar møguleiki vera fyri at røkka settum málum**.

Spurningurin var, hvørt tað er møguligt hjá føroysku tjóðini at fáa nóg nógv prosjekt til høldar tey næstu 10 árini, fyri at broyta verandi gongd. Tá ið mítt boð uppá eitt svar er treytað, er tað tí, at eg kann ivast í, um tað undir hesum umstøðum ber til hjá nóg nógvum stigtakarum at fáa nóg nógv viðkomandi prosjekt til høldar.

Møsn og "kríggj" eru høvuðsavbjóðingarnar í føroysku tjóðini í løtuni.

Tí skal tað vera mín áheitan á øll teirra, sum ynskja at dugna prosjektinum Føroyar, at hvør einstakur ger upp við sjálvan seg, hvussu viðkomandi dugnar sær sjálvum, hvør øðrum í nærumhvørvinum og heildini. Hvør kommuna, hvør oyggj – eisini útoyggjarnar, hvør stovnur, hvør tónleikabólkur, hvørt tíðindafólk, hvør svimjari, hvør felagsskapur, hvørt aðalráð, hvør politikari o.s.fr. Skulu vit venda føroysku skútuni, má hvør einstakur partur av heildini gera upp við sjálvan seg, hvussu ein dugnar heildini heldur enn við makt at skava enn meira burturúr teirri tæguni, vit øll eru í holt við at tøma.

**Tá ið alt hetta er sagt, hoyrir tað eisini við í somu mynd av støðuni, at í teim førum, har tað hevur hepnast at skapa eitt dugnandi arbeiðsumhvørvi kring strategisk prosjekt, dugi eg illa at ímynda mær, at tað gerst nógv betur nakra aðra staðni í heimi.**

Av sær sjálvum ella við uttanfyristandandi initiativi verður einki tilverugrundarlag styrkt. Eins og eitt og hvørt ættarlið í eini og hvørji tjóð hevur um endan á framtíðar tilverugrundarlagi tjóðar, soleiðis stendur okkara ættarlið eisini við framtíðar Føroyum í hondini.

Støðan er hættislig. Men eru vit nóg nógv, sum saman vilja prosjektið Føroyar, vil tað vísa seg, at skútan vendir.

**Signar P. Heinesen**